gult cyan magenta svart

EG MEINI TA ‹

Elin Heinesen skrivar

Jólini ikki fyrr enn desember

Longu í oktobur byrja›u tey at pynta í handlunum her ni›ri. Og nú er um reppi› at vera desembur, men eg eri slettis ikki komin í jólah‡r enn. Alt hetta jólastáki› í ótí› hevur virka› heilt umvent uppá meg. Eg vil ikki hava jól fyrrenn jólini eru, tí eg veri› so troytt og mó› av jólunum, langt á›renn tey eru byrja›! So eg lati oyru og eygu aftur, so nógv sum eg kann, so eg ikki ver›i tikin á bóli av hesum jóla-óløginum, sum skolar út yvir landi›.

Eg haldi ikki, eg eri tann einasta, sum hevur ta› solei›is... Fyri tveimum árum sí›ani, júst um hesa tí›ina, tá dóttur mín var átta ára gomul, funnu børnini í frítí›arheiminum hjá henni uppá at mótmæla at halda jól so tí›liga. Tey gjørdu sær plakatir, sum tey settu upp í vindeyguni út móti fer›slutungu gøtuni St. Kongensgade, har nógv fólk kom framvi› og kundi síggja bo›skapin. Á plakatunum stó› vi› stórum stavum: "Jólini eru ikki fyrrenn í desembur!"

Og jú mínsann. Ta› vakti ans. Hetta var, sum tá drongurin á sinni helt fyri, at keisarin ikki var ílatin! Børnini komu í bæ›i útvarp og sjónvarp og alt.

Tey blivu spurd um, hví tey høvdu funni› uppá hetta. Um teimum ikki dámdi jólahugna? Ájú, ta› var jú nettupp tí tey IKKI vildu hava jólahugnan spiltan, at tey heittu á fólk um at binda fri›! Og kring alt Danaland vóru ta› ivaleyst nógv, sum nikka›u og ásanna›u, at hesi skilagó›u børnini høvdu so púra rætt.

Jólini eru ikki tey somu, sum tey vóru, tá eg var barn í Føroyum. Í seytjan ár havi eg bara tvær fer›ir veri› heima á jólum - seinastu fer› fyri 7 árum sí›ani, so nógv kann vera broytt harheima, sum eg ikki veit um. Men sum eg minnist føroysk jól, eru tey væl meira merkt av jólasálmum og kirkjugongd enn jólini herni›ri. Í Danmark í dag er Jesusbarni› næstan heilt gloymt í øllum rokanum av nissum og jólamonnum. Útvarpi› spælir bara popput jólaløg.

Hvar eru teir hugnaligu fri›arligu jólasálmarnir? Alt er merkt av, at handlarnir vilja tjena sær so nógv oyru sum yvirhøvur gjørligt. L‡singar floyma úr blø›um, sjónvarpi og útvarpi. Handilsgluggarnir skína og bleiktra í alskyns føgrum litum. Og alt ver›ur kryddra› vi› einum ljó›teppi av jólapoppi, sum skal smyrja okkum oyruni og gera knøini bleyt, so vit lættari lata okkum freista.

Ta› eydnast eisini at fáa fólk at renna runt sum ør á gøtum og geilarhornum inn og út úr handlum - ofta mest fyri at hyggja uttan at keypa naka›, tí avger›irnar, um hvat skal keypast til moster Bente og Onkel Søren og øll hini ver›a kortini ikki tiknar fyrr enn í sí›stu løtu av teimum flestu.

Úrvali› er so risastórt, at fólk ver›a púra ørkymla› av tí. Vit mugu jú fyrst vita, hvat er at fáa hjá hvørjum, og hvat ta› kostar í mun til í hinum handlunum. Ta› tekur tí› - og orku. Ísta›in fyri at ansa eftir ney›ars pengapungum okkara og bara hugna okkum í fri› og náum heima, renna vit pøst og vi› sveittabrot avsta› sum sey›ur, i› ver›ur rikin í rætt, og spilla okkum sálarfri›in. Beint nú eru ta› bara hesi strævnu jólini, sum eg bíti merki í. Allarhelst tí eg enn ikki havi loyvt rætta jólah‡rinum innum enn.

Ikki talingur um, at hann sleppur framat fyrrenn 1. desembur! Men so... so vóni eg, at hann kemur.

Í ár havi eg so høvi til naka›, sum eg ikki havi havt høvi til fyrr, sum kanska hjálpir - at lurta eftir føroyskum útvarpi á alnótini! So klárt og t‡›iligt, sum var eg stødd í Føroyum! Eg droymi um at uppliva bara eitt pinkalíti› sindur av tí meira heimliga jólahugnanum, sum eg minnist, at útvarpi› var ein so stórur partur av, tá eg var barn. Men eg óttist fyri, at si›irnir hjá tykkum heima eisini á hesum økinum hava nærkast (ó-)si›unum á fastlandinum...

Men seinasti møguleikin er ikki troyttur, kann eg ugga meg vi› - eg havi eina dóttir, sum er í røttum jólaaldri enn. Børn og jól - ta› hoyrir saman.

Um ikki naka› anna› kann gera ta›, so fer ta› uttan iva fyrr ella seinni at eydnast henni at sleppa jólahugnanum innum og smitta mammu sína vi› rætta jólah‡rinum!

Vikuskifti
Postboks 19, 110 Tórsahvn, telefon 311820, telefax 314720,
teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Bla›stjórn: Eirikur Lindenskov

Íslendska Björk "Dancer in the Dark" – ver›ur hon kosin besti kvinnuligi filmsleikari í Evropa í kvøld?

Dancer in the Dark

- ein filmsvi›ger›

Meinhard Jensen

Dancer in the Dark hjá Lars von Trier var fyri meg ein filmsuppliving av teimum betru. Hann var grípandi, spennandi og skelkandi, aftur og aftur. Hann tók tankarnar og kenslurnar vi› sær, og hev›i næstan ov nógv av gó›um tónleiki til eitt kvøld.

Filmurin er um lagnuna hjá Selmu (Björk), sum er fl‡dd úr Kekkia til USA. Hetta er í sekstiárunum, tá heimurin var eystur og vestur og vinstra høgra. Selma b‡r einsamøll í kampingvogni saman vi› tólv ára gamla soni sínum, og hon arbei›ir á eini verksmi›ju. Um kvøldi› gongur hon til dansivenjing, har hon sleppur at uppfylla ein part av sínum egna privata amerikanska dreymi, sum er at vera vi› í eini musical.

Selma hevur tveir grannar til vinir. Ma›urin er politistur, og konan snobb. Hon heldur seg vera ríka og livir og letst sum um.

Sjálv søgugongdin kemur á gli›, tá vit fáa at vita, at sjónin hjá Selmu er hótt, og hon sparir saman til eina operatión til sonin, fyri at hann kann sleppa undan at síggja so illa sum mamman. So hon goymir næstan hvørt oyra, sum kemur inn. Onkur annar fær áhuga í pengunum, og solei›is uppstendur spenningurin.

Genra

Dancer in the Dark er settur saman av tveimum filmssløgum. Hann er ein sosialrealistiskur filmur, sum eisini er ein musical. Musicalparturin er ein ganda›ur dreymaheimur hjá Selmu vi› tónleiki frá Björk og sterkari litum enn annars. Tónleikurin egnar seg væl til hetta brúki›, tí Björk spælir eitt slag av ídna›arpoppi, sum í nógvum ber brá av at vera framhald av ljó›unum og kenslunum í gerandisdegnum.

Sosialrealisman byggir á krøv frá vinstravonginum um, at listin skal avspegla veruleikan, sum er, at tilveran er eitt strí› millum stættirnar. Lívi› hjá Selmu ver›ur l‡st sum eitt vónleysur bardagi. Stóri fíggindin er metaforiska myrkri› og amerikanska samfelagi›, har arbei›arin er tann stóri taparin.

Aftanfyri bá›ar genrurnar er ein roynd at skapa eina syntesu, sum ikki bert er musical og sosialrealisma, men eitt listarverk í so nógvum løgum, at ta› er torført at greina.

Musicalin ver›ur í filminum l‡st sum naka› amerikanskt, me›an ein fíggindi Selmu skírir hana anti-amerikanska. Hon ver›ur identifisera› vi› sosialismu. Solei›is kemur ta› amerikanska, dagdreymir og amerikanski dreymurin og musicalin at standa ø›rumegin, me›an ta› europeiska, sosialrealisman og arbei›aratilveran standa hinumegin.

Filmurin diskuterar sjálvur filmsgenru, og hvat filmslistin hevur vi› veruleikan at gera. Søgan endar vi› eini vi›merking til, hvussu ting enda í veruleikanum. Tí er gó› grund til at halda, at Dancer in the Dark eisini er ein filmur um forholdi› millum lív og list. Spurningurin fyri hyggjaran er, sum so ofta, hvussu ta› nú fer at enda. Vit ána, at ta› ver›ur antin tragedia ella eitt filmiskt undur _ antin realisma ella dreymur.

Selma

Sjálvandi er Dancer in the Dark ein gó›ur filmur, sjálvt um ta› væl ber til ikki at dáma hann. Men síggja vit burtur frá, hvat einum dámar og einum ø›rum ikki, og gloyma vit filmin sum heild, so haldi eg, at hann skal síggjast fyri Selmu skuld. Lars Von Trier og Björk hava megna› at gera ein persón, sum er so nærverandi og stórur á skíggjanum, at illa ber til at sita stillur í stólinum. Björk seg›i, at ta› tók henni tvey ár at gerast Selma og eitt ár at gerast Björk aftur. Men hon var gla›, tá hon sá, hvussu gó› fólk gjørdust vi› Selmu.

Filmurin vinnur nógv vi› at hava ein so nærverandi persón sum mi›depul, tí partur av temanum er, at Selma er ein klassiskur fæloysingur, sum arbei›ir á eini verksmi›ju, har einstaklingurin ikki telur meir enn eitt sindur. Ta› sn‡r seg um framlei›slu og ikki persónliga lagnu.

Dámar tær tónleikin hjá Björk, so er uppaftur ein orsøk at síggja filmin.

Skriva› og leikstjórna›:
Lars Von Trier
Leikarar: Björk, Cathérine Deneuve
Tónleikur: Björk (soundtrack: Selmasongs)
Filmurin ver›ur s‡ndur í Havnar Bio á Listafólkastevnuni í Føroyum í august næsta ár.

Me›an bumburnar falla

TÓNLEIKUR. Føroysku Afzelius-tulkingarnar stó›u royndina á frálíkari konsert í Nor›urlandahúsinum í vikuni

Ey›un Klakstein

Ósmæ›in og ágangandi sang hann í mikrofonina.

Orkufulli trubadururin úr Vágunum skrála›i um svíkjarar og hetjur, og me›an bumburnar fullu, gjørdist løtan vi› Sámali Ravnsfjall á pallinum í mentanarháborgin í Havn ein serstøk løta.

Hansara tulking av einum av føroysku Afzelius-sangunum, sum eru á finna á n‡ggjari fløgu, sum er gjørd svenska sangskrivaranum og sangaranum til hei›urs, var frálík.

Ákærandi, beisk og erlig.

Júst solei›is sum Bjørn Afzelius kundi ver›a í løtum, tá hann ikki var eymur og kerligur.

Ey›un sannførandi

T‡skvøldi› var konsert í Nor›urlandahúsinum í Havn í sambandi vi› at ein n‡ggj føroysk fløga vi› sangum hjá Bjørn Afzelius kom út.

Ymiskir føroyskir tónleikarar og sangarar luttaka n‡ggju fløguni, sum er gjørd til minnis og hei›urs um svenska tónleikaran, sum doy›i tí›liga í fjør.

Á konsertini vóru átta av løgunum framførd av einum serligum føroyskum Afzelius-bólki, og skiftandi sangarar sungu sangirnar.

Ey›un Nolsøe var í front helvtini av tí›ini, og hann var væl fyri. Hann sang sangir sum Juanita, Ikaros og Sangur til frælsi, og ta› gjørdi hann sannførandi.

Inniligt og intenst

Umframt Ey›un sang eisini ein annar stórur føroyskur sangari, Kim Hansen, tvey av teimum stillu og vøkru løgunum hjá Afzelius.

Og tær løturnar vóru inniligar og intensar. Sangurin um skilna›in og strí›i› í kjalarvørrinum av eydnusomum kærleika - sangurin um Dukkuheimi› - gevur vanliga fólki eitthvørt at hugsa um, og framførslan hjá Kim Hansen av hesum sangi var flott.

Kim sang eisini ein annan av fri›arligu Afzelius-sangunum - Elska meg nú - og ta› var í sama stíli.

Heri Kragesten framførdi ein sang. Ta› var sangurin um tankarnar, tú fært, tá tú ver›ur fimti.

Og so var ta› eisini framf‡sna framførslan hjá Sámali Ravnsfjall.

Sámal Ravnsfjall – orkufullu trubadururin úr Vágunum skrála›i um svíkjarar og hetur

Mynd: Jens Kristian Vang

Ymiskar sí›ur

Føroysku t‡›ingarnar av sangunum hjá Bjørn Afzelius stó›u seg sera væl á konsertini, og spurningurin er nú, hvussu fløguútgávan fer at standa seg.

Eins og á fløguni var pláss gjørt fyri ymiskum sí›um av sangskrivingini hjá Afzelius á konsertini.

Svenski sangskrivarin kundi jú bæ›i syngja teir vøkru og hugtakandi sangirnar, men hann kundi sanniliga eisini hava peikifingurin á lofti, me›an hann sang sínar bersøgnu tekstir um politisk ella menniskjalig vi›urskifti av ymsum slagi.

Eisini lagsbró›urin

Danski sviin Mikael Wiehe hevur samstarva› nógv vi› Bjørn Afzelius. Teir komu sær bá›ir fram í sjeytiárunum, tá teir spældu saman í bólkinum Hoola Bandoola Band.

Seinnu spældu teir aftur saman, og teir settu eisini gongd á sínar solokarrierur.

Mikael Wiehe luttók eisini á konsertini í Nor›urlandahúsinum, og hann tosa›i og sang um politisk vi›urskifti, um at basa levna›inum at ytsta høgravonginum og at vir›a mannarættindini.

Ideologin og hugsjónin var t‡›andi partur av framførsluni, men hann klára›i eisini at krydda hana vi› humori, so ta› gjørdist undirhaldandi.

Ta› var ein gó› føroysk byrjan, og ta› enda›i vi› væl umhugsa›um or›um og tónleiki frá einum politiskt sannførdum svia.

Kanska var ta› eisini sangur til frælsi.

Ideologiin og hugsjónin var t‡›andi partur av framførsluni hjá Mikael Wiehe
Mynd: Jens Kristian Vang

Kim Hansen framførdi tveir av teimum fri›arligu sangunum hjá Afzelius
Mynd: Jens Kristian Vang